## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði. Skýggjað og nakað av sól, men eisini ælaveður í skiftum. Hitin um dagin um 8 stig, um náttina niður í 5 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, sum fráliður minkandi til gul til stívt andøvsgul. Skýggjað og ælaveður, tó í skiftum sólglottar. Hitin um dagin um 8 stig, um náttina niður í 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði. Skýggjað og nakað av sól, men av og á ælaveður. Hitin millum 6 og 10 stig.

# At koma út og fara inn

So komu teir út. Tjaldursungarnir, sum bølt hevur verið yvir hesar vikurnar í stóra svinginum noðuri á Fútakletti.

Fitir og dúnutir ganga teir nú í grasinum har norðuri við bilum súsandi báðumegin við.

Teir komu út. Soleiðis sum so nógvir ungar gera hesa tíðina.

Onnur fara inn. Serliga eru tað politikarar, vit hoyra um, sum skulu fara inn at gera eitt og annað.

Hví teir skulu tað og ikki bara gera tað uttanfyri, er óskiljandi. Serliga hesa árstíðina, nú so ljóst er.

Men soleiðis hava tey nú funnið upp á, at tað skal eita. At fara inn. Líkamikið hvat tey gera, so fara tey inn.

Hara plagar at fara inn, tá hon kennir seg hótta. Situr ofta uttan fyri holuna, men fær hon frænir av onkrum ófrættakendum, fer hon inn at krógva seg.

Kanska er tað hetta sama, politikararnir hava fyri, tá tey altíð skulu inn, hvørja ferð okkurt er á vási?

Tey hava kanska okkurt ófrættakent fyri, sum bara kann gerast inni, har teir eru tryggir og ikki hava fyri neyðini at vænta, at nakar annar órógvar?

Betri skuldu tey gjørt sum tjaldrið. Komið út við onkrum positivum, sum tey so kundu glett onnur við, eins og tjaldrið ger.



*Tjaldursungin er ringur at finna aftur í landslagnum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 22 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 29 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 14 |
| New York | 29 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst í útsynningi úr Íslandi fer norðureftir.



Eitt lágtrýst tekur seg upp yvir Suðurskandinaviu. Køld luft við ælaveðri rekur inn yvir Føroyar norðaneftir .

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/06 kl. 06[00]–17/06 kl. 06 [00]. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm –mált frá 16/06 kl. 06 [00]–17/06 kl. 06 [00]
Avfallið higartil í juni: 62,6 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

17. juni: Tendring/Mánin longst frá jørðini
26. juni: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. juni | 07.51 | 20.21 | 06.51 | 19.21 | 07.06 | 19.36 | 09.51 | 22.21 | 10.51 | 23.21 | 06.06 | 18.36 | 05.06 | 17.36 | 08.06 | 20.36 | 09.06 | 21.36 | 07.36 | 20.06 | 08.51 | 21.21 |
| 19. juni | 08.42 | 21.07 | 07.42 | 20.07 | 07.57 | 20.22 | 10.42 | 23.07 | 11.42 | — | 06.57 | 19.22 | 05.57 | 18.22 | 08.57 | 21.22 | 09.57 | 22.22 | 08.27 | 20.52 | 09.42 | 22.07 |
| 20. juni | 09.27 | 21.52 | 08.27 | 20.52 | 08.42 | 21.07 | 11.27 | 23.52 | 00.07 | 12.27 | 07.42 | 20.07 | 06.42 | 19.07 | 09.42 | 22.07 | 10.42 | 23.07 | 09.12 | 21.37 | 10.27 | 22.52 |
| 21. juni | 10.10 | 22.35 | 09.10 | 21.35 | 09.25 | 21.50 | — | 12.10 | 00.52 | 13.10 | 08.25 | 20.50 | 07.25 | 19.50 | 10.25 | 22.50 | 11.25 | 23.50 | 09.55 | 22.20 | 11.10 | 23.35 |

5 707265 100050 >